UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **6. november 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-99**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 33/2020 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, um teknmálstulkar, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví verða tær sendingar, sum vanliga verða tulkaðar beinleiðis í Kvf, ikki tulkaðar í løtuni?
2. Hvussu verður tryggjað, at sendingar í sambandi við Kommunuvalið verða tulkaðar beinleiðis?

Svar

Eg havi vent mær til Kringvarp Føroya fyri at fáa svar upp á spurningarnar, og svarini verða endurgivin niðanfyri.

Til 1: Teknmálstulkatænastan, t.e. tænastan undir Almannaverkinum, sum tulkar sendingarnar fyri KvF, manglar tulkar. Tað skulu tveir tulkar til fyri at tulka eina Dag og Viku beinleiðis. Í løtuni er ein tulkur í fullum starvi og ein tulkur er í hálvum starvi. Umframt at tulka fyri Kringvarpið hava hesir tulkar eisini aðrar uppgávur. Tí verða tíðindasendingar ikki tulkaðar beinleiðis, men verða lagdar út so hvørt.

Kringvarpið er varugt við avbjóðingarnar á økinum. Í eini roynd at bøta um umstøðurnar hjá teimum fáu tulkunum riggaði Kringvarpið - saman við Almannaverkinum - eitt studio til á Almannaverkinum. Hetta skuldi gera arbeiðið meira effektivt, soleiðis at meira bleiv tulkað.

Somuleiðis hava tulkarnir møguleika at tulka beinleiðis sendingar haðani. Henda skipanin kom í gildi í juni. Onkrar tekniskar avbjóðingar hava verið, og Kringvarpið ætlaði at fara aftur til gomlu skipanina við studio í Kringvarpinum. Í samráð við Almannaverkið er hetta tó broytt, soleiðis, at hildið verður fram við studio á Almannaverkinum.

Stóra avbjóðingin er framvegis talið av tulkum. Teknmálstulkatænastan verður betri mannað fyrst í komandi ári, tá ein tulkur kemur aftur úr barnsburðarfarloyvi.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Til 2: Einasta serstaka sjónvarpssendingin í sambandi við kommunuvalið er sendingin sjálvt valkvøldið. Tá verður sent ymsastaðni frá í Føroyum. Kringvarpið hevur gjørt avtalu við Teknmálstulkatænastuna, soleiðis at sendingin valkvøldið verður tulkað.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ummr@ummr.fo • www.ummr.fo